Oyðing av rottum og músum í Føroyum

Eitt rættar- og mentunarsøguligt yvirlit

Eftir E. A. Bjørk

Føroyar liggja soleiðis fyri, at landsúgdjór sleppa ikki hagar sjálv. Tey súgdjór,ið eru, mugu tí vera førd hagar av menniskjum við vilja ella óvart, ella tey eru komin í eini tíð, táið landfast var við umheimin. Hesum seinna møguleika,ið krevur, at djórini hava havt vetursetu í Føroyum í ístíðunum,ið hvussu er tí síðstu, kunnu vit beinanvegin sleppa. Hildið verður tí eisini, at tey ymissu húsdjórini eru flutt til Føroya av fólki, fyrst og fremst av norrønum landnámsmonnum; viðvíkjandi upprunaliga seyðaslagnum tó møguliga av írskum einbúgvum.

Vill súgdjór í Føroyum eru bert rottur, mýs og harur. Haran er flutt úr Noregi í seinnu helvt av 19. øld, men rottur og mýs hava fólk óvart drigið til landið.

Av hesum djórum hevur húsmúsin (mus musculus) verið saman við fólki langt aftur í tíðina. Orðið mús er eitt av teimum orðum,ið felags eru í øllum indoeuropeiskum málum *(Falk & Torp)*, fornaldarrithøvundarnir Aristoteles og Plinius nevna hana. Nærið músin er komin til Føroya, vita vit ikki. Sum nevnt frammanundan hevur hon neyvan havt vetrarsetu her í ístíðunum *(Degerbøl, Spärck)*. *Degerbøl* heldur ikki líkindi vera til, at írskir einbúgvar hava havt hana við sær; men í sjálvum sær er einki,ið forðar fyri, at teir kunnu hava drigið hana við sær. Eru tað ikki írsku munkarnir,ið

hava havt músina við sær, mugu tað vera norrønu landnámsmenninir, ið flutt hana hava til Føroya.

Fyrstur at nevna músina er *Claussøn Friis* í stykkinum um Føroyar í bók síni »Norriges oc omliggende Øers sandfærdige Bescriffuelse«, ið kom í 1632, men var til í handriti longu í 1592. Í stykkinum um Føroyar, ið er grundað á upplýsingar frá føroyinginum Jacob Oudensen *(Rischel)*, verður nevnt, at eingi onnur »vilde Diur« eru har uttan »Skouffmus«. At skógmúsin (Apodémus sylvaticus) hevur livað í Føroyum, er ikki ætlandi. Ivaleyst er tað húsmúsin, høvundurin sipar til.

O. u. 80 ár seinni (1673) verður músin nevnd hjá *Debes*. Hann sigur, at hon er ikki í øllum oyggjunum, men nevnir ikki í hvørjum oyggjum. Um orsøkina til, at hon er ikki allastaðni, sigur hann, at »en Part ere i den Mening, at de icke kunne lefve på de øer, hvor de icke nu findis«, men leggur tó varin afturat, »hvilket maa staa udi sin Værdi«. Sama sjónarmið var frammi á *Svabos* døgum (1781—82). Hann sigur, at hann helt, at »Jord fra Norderøerne og Halm fra Kolter og andre øer, som ere fri for Rotter og Muus, skulle fordrive dem fra de Huuse, hvori denne Jord eller Halm findes«. Síðan greiðir hann frá, at teir gjørdu eina roynd og førdu mold úr Norðuroyum til Havnar og løgdu hana í eitt úthús, við tí úrsliti, at djórini hvurvu »i temmelig lang Tid«; men tá ið ið tey komu aftur, og royndin aftur varð gjørd, hevði tað onga ávirkan.

Av oyggjum, sum ongar mýs hava, nevnir *Svabo* Norðoyggjar, Koltur, Hest, Skúvoy og Dímun. Aftur at hesum oyggjum leggur *Landt* (1800) Mykines; men hetta er óivað skeivt *(Degerbøl)*. Men eftir Svabos tíð er músin komin til aðrar oyggjar, t. d. til Fugloyar, út í Hest og út í Mykineshólm. Hvussu Músin er komin til Fugloyar, vita vit einki um uttan tað, at har hevur tikið seg fram eitt serstakt slag *(Degerbøl)*. *Jóan Chr. Poulsen* afturímóti dugir at greiða frá, hvussu músin kom út í Hest. Hetta hendi fyrstu ferð í 1908. Tá eydnaðist at oyða tær aftur. Men fyrra heimsbardaga komu tær aftur, og hesa ferð eydnaðist ikki at sleppa av aftur við

tær. Hildið verður, at tær hesa ferð beinanvegin eru blakaðar upp á land av illkynjaðum fólki. Í hesum sambandi kann verða nevnd ásetanin í lóg fyri Føroyar nr. 36 frá 28. februar 1908 um atgerðir ímóti smittandi sjúkum hjá húsdjórum o. a. m. í 16. § seinasta stykki, har sagt verður, at tað at flyta rottur og mýs úr einari oyggj í aðra er ikki loyvt og verður revsað, smb. 17. §. Henda ásetan varð nevniliga sett í lógina av løgtinginum við tí grundgeving, at í »et bestemt Tilfælde« sigst at »være gjort Forsøg paa at indføre Rotter paa en Ø, hvor saadanne ikke fandtes«. (*Lagt.* 1905 B bl. 43). Út í Mykineshólm kom músin ikki fyrr, enn hólmurin fyrst í hesi øld hevði fingið samband við Mykines. Músin er enntá flutt út í hin 85 m høga Grønskoradrang, sum stendur leysur frá landi; men í hesum føri er tað ikki fólk, men fuglur (lundi), ið flutt hevur (*Degerbøl*). Tað, at músin er komin í hesar nevndu oyggjar, er besta avnoktanin av tí, ið eldri høvundar hava skrivað um, at hon livdi ikki har; tað hevði eisini í sjálvum sær verið órímiligt at hugsa.

Til eru ymis sløg av húsmús í Føroyum. Hitt vanliga slagið er í Havn, men í Nólsoy er eitt annað slag (Mus musculus færoensis), ið er eitt sindur størri, og í Mykinesi er somuleiðis eitt annað størri slag (Mus musculus mykinesensis). Har afturat er, sum nevnt omanfyri, í Fugloy eitt slag, ið bregður eitt sindur frá. Til samans skuldi so verið talan um fýra ymis sløg (*Degerbøl, Spärck, Williamson* og *Alwin Pedersen*).

Músin er minni enn so so skaðilig sum rottan. Nógv mús er í fuglabjørgunum, men neyvan ger hon stórvegis skaða, tí hon livir av leivdum frá fuglinum (*Williamson* og *Alwin Pedersen*). Men við hús kann músin gera skaða á sama hátt sum húsmúsin í øðrum londum (*Herluf Petersen*). Í Føroyum legst hon eisini á skerpikjøtið. Eitt stað á tjónum eitur meira at siga músabitin, tí hildið verður, at músini dámar henda bitan serstakliga væl (*Robert Joensen*). Umframt omanfyri nevndu ásetanir í lóg nr. 36 frá 28. 2. 1908 16.—17. §§ og eina ásetan um oyðing av rottum og músum sum atgerð ímóti smittusjúkum í føroysku farsóttarlógini (lóg nr. 86 frá 17. 3. 1922 17. § smb.

25. §), eru allarhelst ongar lógreglur, ið ætlaðar eru til at oyða mýs.

*

Músin hevur verið knýtt aftur at menniskjuni langt aftur í tíðina, men so er, — ið hvussu er Europu viðvíkjandi — ikki við *rottuni*. Orðið rotta er ikki sum orðið mús felags indoeuropeiskt orð. Tað er helst av germanskum uppruna *(Falk & Torp)*. Rottan eitur á fornnorrønum *vølsk* mús og hevur nøvn lík hesum á ymissum keltiskum málum; ætlandi er hon komin fyrst til Suðureuropu og hevur haðani spjatt seg til Norður- og Vestureuropu.

Tað rottuslagið, ið fyrst kom til Europu, var hin svarta rottan (Mus rattus), ið ættað er úr Landsynnings-Asiu. Hon er ætlandi komin til Europu eftir vanligu handilsleiðunum, kann henda við krossferðarmonnunum, tá ið teir komu heimaftur *(Bro Nielsen)*. Í Knýtlinga søga verður sagt, hvussu Ásbjørn, yngri sonur Sven Estridson, ið verið hevði uppi í at drepa Knút hin heilaga í St. Albans Kirkju í Odense hin 10. juli 1086, sama árið doyði syndarliga av at verða bitin til ólívis av rottum. Í søguni sigur, at Ásbjørn svav eina náttina í eini bygd við Oyrasund; tá »komu inn mýss margar valskar; þær vóru miklu stærri enn menn høfðu fyrr sét«. Eftir orðum søgunnar ber til at ætla, at svarta rottan er komin til Danmarkar stutt fyri 1086; haldast má kortini, at frágreiðing søgunnar um deyða Ásbjarnar er heilt ósøgulig, men lænt frá týskari søgn. Aftur at tí er søgan helst skrivað o. u. 200 ár seinni *(Albeck)*, t. e. í eini tíð, tá ið Sóttin svarta fyrstu ferð verður nevnd í bókmentunum av stóra týska skolastikkaranum Albertusi Magnusi, ið livdi 1193—1280 *(Brehm)*.

Rotturnar gjørdust skjótt ring plága, og alt varð roynt til at sleppa frá teimum. Kend er søgan um rottumannin úr Hameln, sum helst byggir á rættiliga hending: at 130 børn úr Hameln hin 26. juni 1284 í einari dansiøði søgdust vera runnin úr býnum og vóru ongantíð komin aftur. Samdømi til tann partin av søgnini, ið fæst við útrekingina av rottum, kenna vit mangastaðni frá, eisini úr Føroyum. Søgnin sigur *(FFÆ)*, at norð-

oyingar og eystringar heittu á ein íslending, sum var ramur í gandi, til at sleppa frá rottupláguni. Hann helt seg til at hjálpa teimum, um hann fekk tveir oksar afturfyri. Tað lovaðu teir honum. Hann stevndi so øllum rottunum saman úti á Raktanga. Tá ið alt var samankomið, spurdi hann, um teir vildu halda orð og geva honum oksarnar. Norðoyingar játtaðu beinan vegin, men eystringar søgdu, at nú vóru teir førir fyri sjálvir at fanga rotturnar. Tá rópaði íslendingurin: »Farið so kvør í sína holu, uttan eingin í Norðoyar!« Og so spjaddust rotturnar aftur út um alla Eysturoy, men í Norðoyum hevur eingin rotta verið síðan, sigur søgnin. Sambært *Svabo* og *Landt* vóru ongar rottur í Norðoyum, og tað man vera tað, ið søgnin vil royna at greina. Nær ið henda rottustevning út á Raktanga hevur verið, sigur søgnin einki um. Men *Svabo* hevur eina samsvarandi frásøgu úr Vágum, og hon er frá 1756. Her verður sagt, at »en matros« við at fáa eitt lítið sindur afturfyri slepti Vágunum frá rottunum; hann flutti tær út á eina hellu vestan til á oynni, og haðani tók stormurin tær. *Svabo* sigur sjálvur, at frásøgan er bert eitt ævintýr og heldur, at orsøkin til, at rotturnar hvurvu, var sjúka, sum tær fingu. Í Danmark kenna vit fleiri sagnir um at reka rottur (og mýs) burtur. Har vóru tað vanliga norðmenn, ið hildnir vóru at hava tílíkar gávur *(E. Tang Kristensen)*. Ofta man tað vera tað, at — eins og í Vágum — rotturnar brádliga eru horvnar, ið orsøk var til, at søgnin kom í. Úr Thy kenna vit til dømis søgn um ein norskan biddara, ið savnaði rotturnar í eini tjørn og mánaði tær niður har, og samstundis verður sagt frá, at allar rotturnar har á leið hurvu í 1826 ella 1827. »Rottustevningar« verða ofta nevndar í donskum søgnum, og *Holberg* sigur, at hann í »den arnamagnæiske samling« hevur sæð »et gammelt Bands-Brev mod Muus og Kirke-rotter«, og *Troels Lund* nevnir »opsigelse« av rottum.

Nær svarta rottan er komin til Føroya, vita vit ikki við vissu. *Landt* sigur, at hon »ej for mange Aar siden har udbredt sig til de fleste Øer«, men *Svabo* nevnir, at hon varð kend bert í Havn og í Vágum. Í Havn segðist hon hava verið

ógviliga leingi, í Vágum afturímóti at vera komin við einum skipi, ið fór á land við Sandavág o. u. 150 ár fyri hansara tíð (smb. *Ludvig Petersen*). Hetta skipbrotið sæst ikki nevnt í tingbókunum, men har stendur (*Tingb.* I bl. 297—98), at eitt reiðiliga stórt enskt skip, á ferð til Ameriku við útflytarum, í 1637 kom inn í Vágar og keypti har nøkur ross og nakrar seyðir. Ikki er óhugsandi, at rottan er komin til Vágarnar við hesum skipi (og kann henda eisini til Vestmanna, har skipið lá í nakrar dagar), tí rottuni tykist betur at dáma skip, sum eru í langfarasigling (*Weissmann*). Sumt týðir á, at ikki fyrr enn um hesa tíðina er rottan komin víða um í Føroyum. *Claussøn Friis* skrivar í 1592, at ongar rottur eru í Føroyum, »thi de kunne icke lefue der«, og hann nevnir í hesum sambandi, at eisini aðrastaðni í Noregi eru stød, har rottan ikki livir. *Lauritzen Wolff* nevnir (1651) stutt og greitt: »der er ingen Rotter, Orme eller saadant Utøj«, og tað, sum *Pedersen Beyer* sigur sløk hundrað ár frammanundan (1567), um at ikki verður føtt nakað »skadeligt djur der paa landet, som er ulv, rev, orm, padde eller andre saadanne« kann verða skilt so, at rottur hava ikki verið í Føroyum, hóast tær ikki beinleiðis eru nevndar. Men meira ivingarsamt er, um *Tarnovius* (1669) hevur viljað undantikið rotturnar, tá ið hann sigur, at tað eru ikki »vilde diur paa Ferøer, huercken Hiorte, Ræffve eller Harer«. Ið hvussu er sigur *Debes* fá ár seinni (1673), at rottur eru, um ikki á øllum oyggjunum. Tá ið vit meta um, hvat teir ymissu høvundarnir hava sagt, mugu vit minnast, at *Lauritzen Wolff* í flestum førum hevur upplýsingar sínar um Føroyar frá *Claussøn Friis*, og vit mugu tí ikki lata tað vera avgerandi, at hann í 1651 skrivar, at rottur eru ikki í Føroyum. Tað ymissa, ið sagt hevur verið, týðir so upp á, at upplýsingar *Svabos* um, nær hin svarta rottan er komin til Føroya, eru rættar. Í hesum sambandi kunnu vit kanska eisini nevna ásetingina í »Store Reces« Kristians IV frá 27. februar 1643, 2. bók, 19. kap. »Om Röttekrud«, har sagt verður, at verður neyðugt at flyta inn rottukrút til Íslands og Føroya, »haffue Lendmændene derudi at giøre An-

ordning«. Ásetingin kann jú benda á, at fyrr hevur ikki verið neyðugt at nýta rottukrút í Íslandi og í Føroyum, viðvíkjandi Føroyum møguliga tí, at rottur vóru ikki har.

Hóast vit av tí her nevnda tora at koma til tað, at hin svarta rottan fyrst í fyrra helmingi av seytjandu øld — kann vera eftir 1637 — er komin víða um í Føroyum, er tað einki ivamál, at rottur hava verið í oyggjunum fyri ta tíð, tó í minni muni. Tað, ið Svabo sigur, man vera so at skilja, at í Havn hava rottur verið frá gamlari tíð. Helst eru tær førdar higar við handilsskipunum, og ætlandi hevur verið væl liviligt hjá teimum í goymsluhúsum handilsins. Eyðvitað kunnu tær eisini vera komnar á land við skipum aðrar staðir í landinum, men møguligt er, sum *Claussøn Friis* sigur, at tær hava ikki livað leingi. Kann vera at rotturnar hava ikki havt nóg mikið fyri munnin uttan fyri Havnina, tí svarta rottan er rættiliga matvandin. Hon er ikki altetandi sum brúna rottan. Á hin bógvin er eftir hetta ilt at greiða, hví rottan eitt ávíst tíðarskeið hevur verið víða um í Føroyum.

Eisini kann tað vera, at rottan hevur verið víðari um longur afturí í tíðini. Hildið verður, at svarta rottan hevur havt nógv at týða fyri útbreiðslu av pest, eisini tí drepsóttini, ið kallað verður Sóttin svarta (Bro Nielsen). Meðan vit mugu halda, at Sóttin svarta eisini hevur herjað í Føroyum *(Tummas Lenvig)*, má svarta rottan hava verið víða um í Føroyum um 1350. Men rotturnar verða eisini smittaðar av sóttini, og er tí ikki óhugsandi, at tær tá eisini eru oyddar. Við skipum eru seinni komnar rottur til Føroya, men tær hava fingið høvdið fyri seg bert í Havn og uttanum, til tess tær í fyrsta helmingi av 17. øld hava breitt seg eisini út á aðrar oyggjar.

Ígjøgnum 18. øld varð svarta rottan troðka burtur av brúnu rottuni (Mus norvegius ella decumanus) í stórum pørtum av Europu. Hetta rottuslagið kemur úr Asiu (Himalaya), men eftir stóran jarðskjálvta floymdi hon inn yvir Europu úr kaspisku londunum. Í 1727 svam hon í stórum skarum um Volgu. Um 1730 stakst hon upp í Onglandi, og var ætlandi komin

hagar við handilsskipum. Til Skotlands kom hon ikki fyrr enn í 1763 og til Noregs í 1762.

Til Føroya kom brúna rottan í 1768 við vrakinum av norska skipinum »Kongen af Preussen«, sum í mai hetta árið rak upp á land í Suðuroy *(Svabo, Landt)*. Vrakið uddi í rottum, og út á heystið í 1768 vóru tey var við brúnu rottuna í Hvalba. Ígjøgnum 1769 breiddi hon seg út um alla Suðuroy, men kom ikki til Sunnbiar fyrr enn í 1770. Longu í 1769 høvdu tey sæð brúnu rottuna í Havn, men um hon var komin hagar úr Suðuroy ella við øðrum skipi, vistist ikki. Frá 1772 breiddu rotturnar seg norður eftir Streymoy og komu til Saksunar 1778—79. Hetta sama ár vóru rotturnar farnar um alla Eysturoy, sum tær vóru komnar til í 1776 (til Eiðis). Í árunum 1779—81 breiddu tær seg í Vágum, og táið *Svabo* gjørdi ferð sína til Føroya í 1781—82, var tað bert í Norðoyum, Sandoy, Skúvoy, Dímun, Hesti, Nólsoy og Mykinesi, at ongar rottur vóru. Enn á *Landts* døgum (1791—98) vóru ongar rottur á hesum oyggjum, og soleiðis hevur ivaleyst verið til inn í hesa øldina. Fyri seinna heimsbardagan vóru rottur tó komnar í tríggjar av Norðoyum: Borðoy, Viðoy og Kunoy *(Jóhannes av Skarði)*, og eisini út í Hest *(Degerbøl)*. Í Kunoy verður sagt, at tað eru fólk í Klaksvík, ið slept hava rottuni upp á land har (Williamson). Í 1957 er brúna rottan funnin í Kalsoy (*Dagblaðið* 16. 7. 1957).

Eins og allastaðni, hagar brúna rottan er komin, hevur hon eisini í Føroyum troðka burtur svørtu rottuna, soleiðis at hon, um hon ikki heilt er oydd *(Degerbøl, Spärck, á Ryggi)*, ið hvussu er, er sera sjáldsom *(Ostenfeld)*. Kortini koma av og á svartar rottur til Føroya við skipum *(Williamson)*; í 1849 rak t. d. eitt vrak inn á Miðvág við svørtum rottum um borð *(á Ryggi)*.

Brúna rottan gjørdi, stutt eftir at hon hevði fingið høvdið fyri seg í Føroyum, stóran skaða. *Svabo* sigur frá, hvussu rotturnar »anfaldt levende Kalve, levende og sovende Menneskers Fødder; Liig i Kirkegaardene, Agrene, Qværne for det Meels

Skyld, som ligger i deres smaa Gruber, Bager-Ovne, som Brød-Lugten har forledt dem til«, hvussu tær hava gnagað hol á bátar og »ædt Ryggen af en levende Koe og 7 Gjæs i 2 Nætter«.

Harafturat nevnir hann, at tær hava gjørt stóran skaða í fuglabjørgunum og í hjøllum. *Landt* nevnir eisini hetta, men tekur serstakliga fram tann skaða rotturnar gera í økrunum.

Við kettum og hundum, rottufellum og rottueitri royndu tey at stríðast ímóti rottunum. Tey royndu eisini onnur minni skilbundin ráð, eitt nú, sum fyrr er nevnt, at taka mold og hálm úr oyggjum, har ongar rottur vóru, til stød, har tey ikki vildu hava rottur at koma. Í hesum sambandi kann verða nevnt, at í søgnini um rotturnar í Eysturoy, sum riknar vórðu út á Raktanga, verður nevnt, at fólkið í Eysturoy seinni tók flag av Blankskála til at sleppa frá rottunum.

Hitt almenna styðjaði bardagan ímóti rottunum við at senda rottueitur til Føroya. *Svabo* sigur, at hetta eitur, har tað verður nýtt — serstakliga í goymsluhúsum handilsins — hevði »sin ypperlige virkning«, men *Landt* afturímóti tykist at hava vánaligari royndir við rottueituri. Hann tekur fram sum best hóskandi til rottubardagan »Katte, Rotte-Saxe og Fælder; thi firgiftede Ting ville de ikke røre«.

Tað kundi litið út fyri, at tann skaði, ið rotturnar hava gjørt, hevur verið minkandi í nítjandu øld til fram undir endan á øldini. *Ostenfeld* skrivar (1905), at rottan fyrr var »indskrænket til de få større Handelspladser«, men at hon gjøgnum 19. øld »ved den livligere og lettere Forbindelse mellem øerne indbyrdes« hevur breitt seg »fra Ø til Ø«. Sum fyrr nevnt vóru við endan á øldini rottur neyvan á øðrum oyggjum, enn har tær vóru við aldarbyrjan, men meira sambandið við onnur lond eftir avtøku einahandilsins hevur ivaleyst fört fleiri rottur til landið, so at menn við endan á øldini fingu áhuga fyri meira skipaðari oyðing av hesum skaðadjóri. Fyrsti vitnisburður um hetta er, at á grannastevnu í Vestmanna varð gjørd samtykt um oyðing av rottum. Hetta hendi 5. apríl 1895. Innihaldið í samtyktini sæst ikki í løgreglugerðarbókini,

men upplýst verður, at hon skuldi bert galda í eitt ár. Vit hava ætlandi loyvi at halda, at oyðingin hevur verið munadygg, tí samtyktin sæst ikki at hava verið framlongd. Sjey ár seinni — hin 4. mars 1902 — varð á grannastevnu í Kvívík viðgjørt mál viðvíkjandi »Ødelæggelse af Rotter«, men av tí, at ikki nóg nógvir húsbóndur vóru á stevnuni, kundi eingin samtykt verða gjørd í málinum. Áhugin fyri rottuoyðingini tykist so ikki at hava verið serstakliga stór í Kvívík tá.

Sama var, tá ið fimm ár seinni lagdur varð fyri løgtingið spurningurin um at seta donsku rottulógina frá 1907 í gildi í Føroyum; men áðrenn meira verður sagt um støðu løgtingsins til málið, er hóskandi at gera grein fyri undirstøðuni hjá hesi fyrstu rottulóg.

Í 1898 hendi á eini heilsubótarstovu í Wien nakað, ið gjørdist stórtíðindi í Europu. Ein hjálparmaður á stovuni varð bitin av eini pestsjúkari rottu og varð smittaður. Sama hendi ein lækna og tvær sjúkrasystrar, ið vóru um hann, og øll fýra doyðu. Ein, ið las um hesa hending í bløðunum, var danin og verkfrøðingurin *Emil Zuschlag* (1859—1941), sum var húsaeigari í Keypmannahavn og tí var kunnugur við, í hvussu stóran mun Keypmannahavn var fongd av rottum. Zuschlag óttaðist fyri, at tær mongu rotturnar kundu fara at kveikja eina pest-umfarsótt í Keypmannahavn. Hann fekk í lag, at kallað varð til fundar í »Københavns Grundejerforening« hin 29. november 1898, har stovnað varð felag við tí endamáli við lóg at fara í oyðingarkríggj móti rottunum um alt landið í senn. Zuschlag varð valdur formaður í felagnum. Men torført royndist at fáa yvirvaldið at fata, at tað var tess verkevni at fáa framda oyðing av rottunum. Við studningi ymsastaðni eydnaðist at fáa til vega pening, so at latin kundi verða virðisløn upp á 10 oyru fyri hvørja rottu, ið fingin varð, og í 18 vikur í 1899 eydnaðist at fanga o. u. 103.000 rottur í Keypmannahavn. 8 ár gingu, áðrenn tað eydnaðist, við ótroyttandi arbeiði Zuschlags, at fáa framda lóg nr. 59 frá 22. mars 1907 um atgerðir til oyðing av rottum. Lógin byggir — eins og samsvarandi lógir, ið samtyktar vórðu í flestum londum í

Europu í árunum fram til fyrra heimsbardaga — upp á virðislønarskipanina. *(Stubbe-Teglbjærg).*

Eftir lógarinnar 6. §, 2. stk. kundi hon við kongligari fyriskipan verða sett í gildi í Føroyum, og spurningurin um tað varð við skrivi dagfest 22. mai 1907 frá løgmálaráðnum lagdur fyri løgtingið, har áhugin fyri at fáa hana framda tó ikki var stórur. Ein løgtingsnevnd mælti til, at bíðað skuldi verða eftir úrslitinum av endurskoðan donsku lógarinnar. Tí hon skuldi eftir 6. §. 1. stk. galda bert í 3 ár. Endin var tó tann, at tingið samtykti at biðja um ummæli frá kommununum, áðrenn endalig støða varð tikin til spurningin. (Lagt. 1907 bls. 85—86). Men kommunurnar høvdu ikki stórvegis áhuga fyri lógini, og tingið meinti heldur ikki, at lógin »ville have nogen større Betydning på de fleste Pladser på Færøerne for nærværende Tid«, serstakliga tí at ætlast kundi »at den Skade, der forårsages af Rotter, ikke har været nævneværdig eller følelig«. Løgtingið ráddi tí frá at seta lógina í gildi í Føroyum, men bar fram ynski um, at endurskoðaða lógin, táið hon var komin, varð løgd fyri tingið til umhugsunar. (Lagt. 1908 bls. 72—74).

Fyrsta viðgerð løgtingsins av rottulógini var í august—september 1907, men longu 20. apríl sama ár var lógin vorðin kunngjørd at galda í Føroyum í »Dimmalætting«, og kunngerð nr. 107, ið ásetti, at lógin skuldi koma í gildi hin 1. juli sama ár, varð kunngjørd í »Dimmalætting« hin 22. juni 1907. Hesar kunngerðir í »Dimmalætting« áttu sær stað sambært (ta enn galdandi) lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 um kunngerð av lógum og fyriskipanum í Føroyum. Eftir hesi lóg skal afturat vanligu kunngerðini av lógum og fyriskipanum o. øðr. m., táið um Føroyar er at røða, koma kunngerð í »Dimmalætting« (»den til Optagelse af offentlige Bekendtgørelser paa Færøerne autoriserede Tidende«), smb. 1. §, og tinglesing í rættinum í Tórshavn, smb. 2. §, sum sigur, at lógin (fyriskipanin el. a.) kemur í gildi um allar Føroyar 4 vikur eftir kunngerðina í »Dimmalætting«, uttan so at aðrar ásetingar eru í sjálvari lógini um hetta, smb. 3. §. Men 6. §, 2. stk. í rottulógini

hevði, sum fyrr nevnt, ta áseting, at hon kundi ikki setast í gildi í Føroyum uttan við kongligari fyriskipan, og av tí fylgdi, at hon kundi ikki koma í gildi her, fyrr enn slík fyriskipan var givin og kunngjørd á tann hátt, ið lógin frá 1. apríl 1896 fyrisetur. Kunngerðin av rottulógini og tann kunngerðin, ið hoyrir saman við henni, frá 1. mai 1907 í »Dimmalætting«, var tí týdningarleys og er at meta sum eitt dømi um vanligt vantandi reglufesti, útint av fyrisitingini viðvíkjandi kunngerð av lógum sambært lógina frá 1. apríl 1896. Her er ikki rætta staðið at gera meira við henda spurningin, men nevnt skal kortini verða, at ígjøgnum árini er hópur av lógum settar í gildi, sum ikki høvdu og eftir innihaldi sínum ikki kundu hava minsta týdning fyri Føroyar, t. d. lógir um jarnbreytir í Danmark og øll tann mikla lóggáva at fáa í lag danskan rætt í suðurjútsku landspørtunum eftir sameiningina aftur í 1920.

Men aftur til rottulógina! Lógin frá 1907 varð avloyst av lóg nr. 96 frá 18. apríl 1910 um atgerðir til at oyða rotturnar. Í hesi lóg var einki fyrivarni viðvíkjandi Føroyum, sum í lógini frá 1907, møguliga tí at hon ikki, sum lógin frá 1907, legði treyt á kommunurnar til at lata pening til rottuoyðingina. Hóast tað ynski, sum løgtingið í 1908 hevði nevnt, at fáa nýggju lógina fyrilagda, sæst ikki, at lógin frá 1910 hevur verið løgd fyri tingið, men hon er uttan orð og boð sett í gildi í Føroyum við kunngerð í »Dimmalætting« hin 4. juni 1910. Við tað at lógin ongar serstakar ásetanir hevði um, nær hon skuldi koma í gildi, kom hon so — smb. lógina frá 1. apríl 1896 3. § — í gildi í Føroyum 4 vikur seinni, t. e. 2. juli 1910. Eftir 5. § í lógini skuldi hon galda í bert 5 ár. Uppskot um at leingja hana varð lagt fram í ríkisdagssetuni 1914/15, men varð ikki framt. Latið varð upp í hendurnar á felagnum, sum Zuschlag hevði stovnað: »Foreningen til lovordnet Udryddelse af rotter« at varðveita tey úrslit, sum hagartil vóru vunnin í Danmark.

Tá ið umsókn í mai 1915 varð send til løgtingið við bøn um at gera tiltøk til at oyða rottur, var tí hvørki í Danmark ella í Føroyum nøkur lóggáva um henda spurning.

Málið viðvíkjandi rottunum tykist í 1915 at hava ligið í aðrari legu enn í 1907—08, tá ið hildið var, at tann skaði, rotturnar voldu, var lítilverdur. Í nevndu umsókn verður sagt, at tað »maa siges at være almindelig bekendt, hvilken Skade Rotter anrette både ude og inde, ikke mindst på Korn- og Kartoffelhøsten«. Tann løgtingsnevnd, ið fekk málið til viðgerðar, tók undir við hesum sjónarmiði í áliti sínum frá 30. august 1915. Nevndin legði enntá dent á »den Skade, som Rotterne forvolde i Fuglepladser«, og segði sum sína áskoðan, at rotturnar »sikkert i de senere År« hava »formeret sig stærkt siden Hvalstationerne blev oprettede«. (*Lagt.* 1915 bl. 181—83). Hvalaveiðin var í hæddini fyrst í hesi øldini, tá ið hvalastøðir vóru á Gjánoyri, í Norðdepli, í Selvík, í Lopra, í Funningsfirði og á Signabø, men árini fram undir fyrra heimsbardaga var veiðin minkað nakað, og í krígsárunum helt hon heilt uppat *Stove* & *Jacobsen).* Tað er sannlíkt, at hvalastøðirnar hava haldgað nógvar rottur upp á seg av tí nógva mati, tær funnu har, men meðan rotturnar kundu vera á hvalastøðunum, hava tær neyvan gjørt stórvegis skaða aðrastaðni, við tað at vit kunnu hugsa okkum, at hvalastøðirnar hava drigið rottur at sær úr øðrum støðum. Tað man vera við hesum í huga, at løgtingið bar fram sítt ynski í 1908. Men tá ið nú hvalastøðirnar minkaðu um virki síni ella hildu heilt uppat, noyddust rotturnar at leita sær eftir føði á øðrum støðum, og er tí náttúrligt, at rotturnar eru vorðnar naskar í 1915. Krígsviðurskiftini hava sjálvandi eisini gjørt sítt til, at skaðin kendist dyggari. Men løgtingið helt seg tó ikki fört fyri at »anbefale Iværksættelse af omfattende Foranstaltninger imod Rotterne«, men helt, at ein átti at »forsøge at iværksætte Prøver med rotteødelæggende Midler« og læt amtmanninum 50 — fimmti! — krónur at ráða yvir til hetta endamál. (*Lagt.* 1915 bl. 183—84).

Úrslitið av kanningum amtsins var ein frágreiðing (í Dimmalætting 19. 4. 1916), har serstakliga evnið ratin verður tikið fram sum týdningarmikið. Løgtingið meinti so, at meðan nú vóru »fremskaffet og bragt til Befolkningens Kundskab

Oplysninger om et virksomt Middel til Ødelæggelse af Rotter og Mus og om Anvendelse af Midlet«, var eingin orsøk til, at tingið legði fyri við atgerðum ímóti hesum djórum, við tað at tað, ið neyðugt var at gera tí viðvíkjandi, átti at »iværksættes af Kommuner, Foreninger eller Enkeltmænd«, sum møguliga kundu venda sær til tingið við bøn um studning, uttan at tingið tó frammanundan vildi binda seg til ávísa støðutakan til sovorðnar umbønir. (*Lagt.* 1916 bl. 129).

Støðan var nú at kalla hin sama sum í Danmark. Rottuoyðingin varð latum einstaklingum (møguliga kommunum) upp í hendur. Í umsóknini frá 1915 var nevnt, at á grannastevnu kundu avgerðir verða gjørdar um bardaga ímóti rottuni, og úr Hvalvík og Streymnesi eru eisini til skjals samtyktir um oyðing av rottum. Eftir fyrru samtyktini — frá 4. februar 1916 — skuldi hvørt hús á hesum bygdum gjalda 30 oyru til at útvega rottueitur fyri og til at løna tveimum monnum, ið skuldu standa fyri útveganini av eitrinum, arbeðinum við at leggja eitrið og innheintingini av peninginum. Meginreglan var tann, at tað var skylda hjá hvørjum húsbónda at leggja eiturið, men har, sum húsbóndin var burturstaddur, skuldu teir báðir menninir síggja fyri, at arbeiðið varð gjørt. Vóru hesi 30 oyru ikki nógmikið, skuldi neyðugur peningur verða latin av jørðini eftir markatali. Hin samtyktin — frá 30. mai 1917 — hevði sama innihald. Umframt hesar grannastevnusamtyktir tykjast ongar atgerðir at hava verið gjørdar til bardaga ímóti rottunum, og eingin umsókn sæst at vera send løgtinginum um stuðul til tílíkan bardaga.

Í Danmark varð spurningurin um aftur at fáa rottulóggávu tikin upp í 1918, smb. cirk. nr. 152 frá 6. september sama ár, men tað var ikki fyrr enn pestin eftir kríggið stakk seg upp í ymsum havnum í Europu, at nýggjar ásetanir um bardaga ímóti rottunum vórðu fingnar við lóg nr. 245 frá 6. mai 1921. Við tað at lógin einki fyrivarni hevði viðvíkjandi Føroyum, kundi hon uttan nakað verða sett í gildi við kunngerð í »Dimmalætting«, men hetta varð ikki gjørt, og kann tað vera ein avleiðing av tí vanliga skortandi reglufesti viðvíkj-

andi kunngerðing av lógum at fáa gildi í Føroyum. Einki sæst til, at løgtingið hevur verið spurt viðvíkjandi lógini.

Lógin frá 6. mai 1921 skuldi eftir 5. § hennara verða løgd fyri í ríkisdagssetuni 1923/24 til endurskoðan, og hetta varð eisini gjørt, og lógin varð avloyst av lóg nr. 92 frá 29. mars 1924, sum, mótsett fyrru lógunum, ikki var tíðarbundin. Í henni var einki — heldur enn í rottulógunum frá 1910 og 1921 — fyrivarni viðvíkjandi Føroyum. Hon kundi so statt verða sett í gildi við kunngerðing í »Dimmalætting«; men við tað at lógin í stórum hevði sama innihald sum 1921-lógin, sum ikki var kunngjørd í Føroyum, lá nær at hugsa, at 1924-lógin heldur ikki fór at verða sett í gildi í Føroyum, men við vanligum ósamsvari varð 1924-lógin kunngjørd í »Dimmalætting« 3. mai 1924. Heldur ikki sæst, at løgtingið hevur verið spurt viðvíkjandi hesi lóg.

Eftir 1. § í lógini høvdu kommunurnar heimild til at veita studning til rottuoyðing og í vissan mun eisini at áleggja fastognarmonnum í kommununi at fremja slíka oyðing. Hjá keypstaðarkommunum var tað beinleiðis skylda annaðhvørt sjálvar at seta í verk rottuoyðing ella at síggja fyri, at fastognarmenninir gjørdu tað. Henda skylda hevur ætlandi eisini ligið á Havnar kommunu, sum eftir lóg nr. 126 frá 27. mai 1908 helst var at rokna sum keypstaðarkommuna ella,ið hvussu er, javnmett við slíka, smb. her 1. §, 2. stk. í rottulógini, har tað stendur, at henda nevnda skylda lá á ikki bert rættiligum keypstaðarkommunum, men eisini »Flækker og Handelspladser«.

Rottulógin frá 1924 tykist tó ongantíð at hava verið nýtt í Føroyum. Hetta sæst eitt nú av einum máli um rottuplágúna, sum viðgjørd varð á løgtingi í 1937. Tað var Gjáar búnaðarfelag,ið hevði eina áheitan á tingið um »at der foranlediges iværksat et systematisk Arbejde til Udryddelse af Rotterne på Færøerne«. Tingið helt, at tað, táið hugsað varð um, »at Rotterne aarlig ødelægger store Værdier saavel i Husejendomme som i Marker og Fuglefjelde«, hevði verið »rimeligt, om der fra offentlig Side etableredes rationel Udryddelse«,

sum mátti fevna um allar oyggjarnar, um varandi úrslit skuldi verða fingið. Men arbeiðið við hesum mátti eftir tingsins ætlan liggja á kommununum, sum eisini mátttu gjalda útreiðslurnar til at útvega eitur. Løgtingið játtaði tó 500 krónur til at løna einum leiðbeinara. (*Løgt.* 1937 bls. 237—38).

Skipanin av rottuoyðingini varð annars latin upp í hendurnar á løgtingsins vinnunevnd, ið spurdi kommunurnar, um tær vildu taka lut í útreiðslunum, ið stóðust av rottuoyðingini. Upp á henda spurning svaraðu 27 kommunur játtandi og 8 noktandi, men 8 kommunur svaraðu als ikki ella góvu einki endaligt svar. Í løgtingssetuni 1938 varð samtykt at royna at oyða rotturnar í Eysturoy, har allar kommunurnar høvdu játtað at taka lut í útreiðslunum, og latið varð landsnevndini upp í hendur at seta oyðingina í verk. (*Løgt.* 1938 bl. 198).

Høvdu teir í 1937—38 givið tí gætur, at danska rottulógin frá 1924 var í gildi í Føroyum, hevði løgtingið neyvan noyðst at latið studning til bardagan ímóti rottum, við tað at tílíkur studningur ætlandi kundi verið latin úr ríkiskassanum eftir 2. § í lógini, bæði til leiðbeinaran og til útvegan av rottueitri, smb. tær gjølligari ásetingarnar í cirk. nr. 174 frá 4. 12. 1924.

Í Danmark fór rottulógin frá 1924 úr gildi við lóg nr. 116 frá 31. mars 1938, sum nú er avloyst av lóg nr. 120. frá 3. mai 1961. Eingin av hesum lógunum var í gildi í Føroyum, smb. lógina frá 1924 15. § og lógina frá 1961 12. §. Í Føroyum varð danska rottulógin frá 1924 formliga verandi í gildi, til hon varð avloyst av løgtl. nr. 40 frá 1. juni 1961 um bardaga ímóti rottum, sum tó ikki beint fram tekur lógina frá 1924 úr gildi.

Grundarlagið undir lógini er uppskot frá fyristøðumanninum fyri Statens Skadedyrslaboratorium (Hans Wichmann), sum í mai 1959 eftir áheitan landsstýrisins ferðaðist um í Føroyum til tess at kanna líkindini til at oyða rotturnar. Álit fyristøðumansins var liðugt í juni 1959, men varð tó ikki lagt fyri tingið fyrr enn í 1961. (*Løgt.* 1960 bl. 141—45). Lógin varð at enda samtykt á tingi 17. mars 1961, staðfest av løgmanni hin 1. juni s. á. og kunngjørd í »Dimmalætting« 9. august

s. á. Nær hon veruliga er komin í gildi, er eitt sindur ivingarsamt, tí 11. § í lógini sigur um hetta: »Henda lóg kemur í gildi ..... 1961« (í danska tekstinum: »Denne lov træder i kraft ..... 1961«). Endurtikni teksturin er úr tí uppskoti, sum landsstýrið legði fyri løgtingið, og hvørki í sambandi við løgtingsviðgerðina ella kunngerðina er settur nakar dagur, at lógin skal koma í gildi. Vit kunnu dømmast um, hvørt lógin kom í gildi 4 vikur eftir kunngerðina (smb. løgtl. nr. 1 frá 13. mai 1948 3 §, 1. stk. samanborið við kunngerð nr. 2 frá 9. mai 1940, 2. § og lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 3. §) ella ikki fyrr enn við ársenda 1961. Spurningurin hevur tó ongan veruligan áhuga, við tað at 1. § í lógini ber í sær, at tær gjølligaru reglurnar fyri rottuoyðing skuldu verða givnar við reglugerð, og henda reglugerð varð ikki givin fyrr enn 16. mai 1962 (kunngerð nr. 20 frá sama degi), t. e. um eitt mund, tá ið lógin í øllum førum var í gildi.

Niðanfyri skal verða gjørd ein gjøgnumgongd av fyriskipanunum í lógini og reglugerðini, sum skiftast kunnu í hesar bólkar:

1) skyldurnar hjá kommununum,
2) skyldurnar hjá einstaklingum,
3) verkevni búnaðarráðgevarans,
4) tvingsil til fremjing av rottuoyðing.

1. Skyldurnar hjá kommununum.

Eins og eftir donsku lógini liggur tað á kommununum at seta í verk rottuoyðing. Hetta skal verða gjørt eina ferð um árið ta tíð og á tann hátt, sum landsstýrið avger, smb. 1. § í lógini. Í 1. § í reglugerðini varð upprunaliga avgjørt, at árliga oyðingin skuldi verða í tíðini 1.—10. november, men hetta varð seinni broytt (við kunngerð nr. 61 frá 6. nov. 1962) til 14.—25. november. Fyrsta rottuoyðingin kann tó verða gjørd í 3 stigum, so at 1/3 av oyggjunum verður tikin í senn, tó má eingin oyggj av teirri orsøk verða býtt. Teir partar, sum eina ferð eru viðgjørdir, skulu síðani viðgerast á hvørjum ári.

Skyldurnar hjá kommununum viðvíkjandi rottubardaganum

eru tær, at tær skulu taka lut í fyrireikandi arbeiðinum, fáa til vega tað neyðuga tilfarið og seta ein eiturleggjara.

Viðvíkjandi fyrireikandi arbeiðinum stendur í 4. §, 3. stk. í reglugerðini at kommunurnar skulu hjálpa búnaðarráðgevaranum við tí, summpart við at lata høli, har landbúnaðarráðgevarin kann samráðast við eiturleggjararnar, summpart við, um neyðugt, at útvega hjálparar. Tá ið her er talan um fyrireikandi arbeiði, er her helst hugsað um skrivstovuhjálp.

Skyldan hjá kommununum til at útvega tilfar er umrødd í 2. § í reglugerðini. Av tí skilst, at fyrst og fremst er hugsað um eitur og kassar at leggja í.

Útreiðslurnar hjá kommununum eru nevndar í 8. § í lógini og 4. §, 1.—2. stk. í reglugerðini. Eftir seinast nevndu áseting hevur hvør kommuna skyldu til at seta ein álítandi mann, ið skal standa fyri at leggja rottueiturið og tí arbeiði, ið av tí stendst. Til at hesin maður kann fáa tær neyðugu royndir, eigur sami maður at verða settur hvørt ár. Smáar kommunur kunnu eftir nærri avráðing við landsstýrið seta ein »eiturútleggjara« saman. Løn »eiturútleggjarans« ásetur kommunustýrið, tó so at hon í minsta lagi samsvarar lønini hjá ólærdum arbeiðsmanni á staðnum, smb. 8. § í lógini. Eftir 4. §, 3. stk. í reglugerðini skal kommunan á hvørjum ári fyri 1. juni siga landsstýrinum frá, hvør ið settur er sum eiturútleggjari.

Útreiðslurnar av hesum ymissa verða eftir lógarinnar 6. § at gjalda av kommununum. Í greinargerðini verður nevnt, at hildið verður náttúrligt, at tær einstøku kommunurnar bera hesar útreiðslur, tó so at fíggjarliga illa staddar kommunur kunnu fáa studning til tess úr landskassanum. Greinargerðin vísir í hesum sambandi til lógarinnar 7. §, sum sigur, at heimild er bert til at lata kommunum ókeypis eitur ella fóðurkassar, men ikki til at gjalda t. d. løn eiturútleggjarans, sum jú kann vera heilt stór útreiðsla.

2. *Skyldur hjá einstaklingum.*

Lógin skilir her ímillum skyldur, ið liggja á fastognarmonnum (3. §), og skyldur, ið liggja á ánarum av matvøruvirkjum (4. §).

Eftir lógarinnar 3. § hevur hvør eigari ella ánari (»ejer eller besidder«, t. e. festari, uppsitari, leigari o. s. fr.) skyldu at geva seg undir, at rottueitur verður lagt á hansara grund, og at hjálpa »eiturútleggjaranum« sum best. Í greinargerðini verður sagt, at royndir úr øðrum londum hava sýnt, at neyðugt er at áleggja fastognarmonnunum hesar skyldur, sum eru nærri umrøddar í 5. § í reglugerðini. Her verður ásett, at hvør eigari og leigari er skyldugur til at geva seg undir, at kannað verður, um rottur eru í húsum hansara ella jørð, og at eitur verður lagt har, og at hjálpa teimum, ið standa fyri rottuoyðingini »bæði innanhýsis, í bø, haga og bakka«.

Meiri skylda verður eftir 4. § løgd á eigarar, fyristøðumenn ella leigarar av virkjum, har matvørur verða framleiddar, goymdar ella seldar, við tað at teir skulu gera tiltøk til, at rottur sleppa ikki í tey rúm, har matvørur verða goymdar, og til, at lívstreytirnar hjá rottunum verða skerdar sum mest. Orðið »levnedsmidler«, sum nýtt er í danska tekstinum, kann bert verða nýtt um matvørur til fólk, orðið »føðievni« afturímóti, ið nýtt er í føroyska tekstinum, hevur víðari týdning, so sum tað eisini ger vart við seg í 6. § í reglugerðini, ið sigur: »Eigari og leigari av virki, sum hevur framleiðslu, goymslu ella sølu av *føðievni til menniskjur og djór*« (tant her). Annars verður skylda ánaranna í nevndu 6. § ásett sum skylda til á annan bógvin at gera eftir teimum boðum, sum kommunan gevur til at forða fyri, at rottur koma inn í húsini ella hava tilhald á stykkinum uttanum, og á hin bógvin at beina burtur alt rusk, ið kann fáa rottur at marknast har.

Hesar serstøku skyldur liggja bert á ánarunum av omanfyri nevndu virkjum. Sagt verður í greinargerðini, at ein vildi ikki lata tær strangaru reglurnar í 4. § í lógini galda allar ognir, so sum gjørt er í øðrum londum — smb. t. d. 3. §, 2. stk. í donsku rottulógini frá 3. mai 1961 — tí smáum kommunum hevði verið torført at framt hesar ásetingar viðvíkjandi øllum ognum, summpart tí tað er ov kostnaðarmikið, og summpart »tí tað er ikki so lætt at seta ígjøgnum hjá teim, sum hava hesi mál í hondum«.

3. Verkevni búnaðarráðgevarans.

Eftir lógaruppskoti landsstýrisins skuldi verða settur ráðgevari, við samsýning ásettari í fíggjarlógini, til at hjálpa landsstýrinum við at útinna lógina og at hava eftirlit við, at hon verður hildin. Løgtingið broytti uttan grundgeving hesa áseting til, at hetta verkevni skuldi búnaðarráðgevarin hava í hondum, smb. 9. § í lógini, og var hetta annars tað einasta, ið tingið broytti í uppskoti landsstýrisins.

Í greinargerðini verður sagt, at ráðgevari landsstýrisins (verður so nú búnaðarráðgevarin) hevur ikki bert myndugleika til »at stíla fyri rottuoyðingini«, men hevur eisini eftirlit við, at kommununnar gera tær skyldur, ið á tær eru lagdar, og kann har afturat »fyriseta treytir til tryggingar av føðievnisvirkjum«.

Av hesum sæst, at tað er trífalt verkevni, ið her verður lagt á búnaðarráðgevaran. Viðvíkjandi fyrsta parti av verkevninum — »at stíla fyri rottuoyðingini« — verður ásett í 4. §, 3. stk. í reglugerðini, at búnaðarráðgevarin saman við eiturútleggjara kommununnar skal leggja arbeiðið til rættis og gera eina ætlan fyri rottuoyðingini í kommununi. Annars hevur hann jú, sum 9. § í lógini sigur, tað verkevni, at hjálpa landsstýrinum yvirhøvur við at útinna lógina, og í hesum sambandi kann kanska verða víst til 2. § í lógini og 3. § í reglugerðini um, at bert mugu nýtast eiturevni, ið góðkend eru av landsstýrinum, og at tað má hugsast at vera náttúrligt verkevni hjá búnaðarráðgevaranum at geva landsstýrinum ráð viðvíkjandi nýtslu av røttum eiturevni. Har ið — sum nevnt í greinargerðini — spurningur kann vera um, hvørt eiturevni eru skaðilig fyri fólk og djór, má landsstýrið tó styðja seg við læknafrøðiliga og djóralæknafrøðiliga serkunnleikan, so statt landslæknan og landsdjóralæknan.

Síðan er verkevni búnaðarráðgevarans at hava eftirlit við at lógin verður hildin. Í greinargerðini verður, sum omanfyri nevnt, dentur lagdur á eftirlitið við, at kommunurnar gera sínar skyldur, og tað er eisini hesin spurningurin, ið nevndur er í 7. § í reglugerðini, har ið álagt er honum at siga lands-

stýrinum, hvat ið møguliga er at átala hesum viðvíkjandi. Men 9. § í lógini leggur tó á búnaðarráðgevaran skyldu yvirhøvur at ansa eftir, at fyriskipanir lógarinnar verða hildnar, og tí má eisini liggja á honum at hava eftirlit við, at einstaklingar gera skyldur sínar. Hetta skilst eisini av 4. §, 3. stk. í lógini, har búnaðarráðgevarin (saman við løgregluni) skal ansa eftir, at hildin verða givin boð og settar freistir viðvíkjandi matvøruvirkjum, og serstakliga 4. §, 2. stk., sum sigur, at búnaðarráðgevarin hevur eftirlit við, at ánarar av hesum virkjum gera eftir lógarinnar fyriskipanum.

Í greinargerðini verður at enda nevnt sum 3. verkevni búnaðarráðgevarans at fyriseta treytir og geva gjølligar fyriskipanir viðvíkjandi matvøruvirkjum. Sagt kann verða, at hetta er ein liður í hjálparstarvsemi hansara yvirhøvur og øðrum verkevnum viðvíkjandi útinnan av lógini, men tá ið hesar treytir og fyriskipanir serstakliga eru tiknar fram í lógarinnar 4. §, 2 stk, er náttúrligt, at greinargerðin hevur nevnt hetta sum serstakt verkevni. Í 4. §, 2. stk. stendur, at búnaðarráðgevarin kann, tá ið hildið verður neyðugt, fyriseta ánarunum av matvøruvirkjum treytir til at fremja neyðugar atgerðir til bardaga ímóti rottum sambært teimum skyldum, ið liggja á ánarunum eftir 4. §, 1. stk. Hesar treytir at fyriseta kunnu ætlandi hava eyðkenni av vanligum fyriskipanum fyri øll matvøruvirki ella fyri einstakar bólkar av teimum, eins og fyriskipan fyri einstakt virki. Við tað at strangar rættarfylgjur kunnu standast av ikki at fylgja boðunum í 4. §, 2. stk. — smb. lógarinnar 5. § og meiri niðanfyri — má helst verða kravt, at meira at kalla vanligar fyriskipanir hava afturat sær ítøkiligar fyrisettar treytir fyri hitt einstaka yrkið, áðrenn rættarfylgjurnar koma. Freistin at gera eftir slíkum fyrisettum treytum er sambært 5. § í lógini sett til ein mánað, men neyvan kann vera nakað, ið forðar fyri, at búnaðarráðgevarin gevur longri freist, so sum eisini tykist ætlað í 4. §, 3. stk. í lógini, har ið talað verður um »givnar freistir«, sum hevði verið óneyðugt, um bert hevði kunnað verið talan um mánaðarfreist.

Eftir 4. §, 2. stk. í lógini er tað bert búnaðarráðgevarin, ið kann fyriseta hesar umrøddu treytir, men eftir 6. § í reglugerðini kunnu kommunurnar geva virkisánarunum boð um at seta í verk atgerðir til at forða fyri, at rottur koma inn í hús teirra ella inn á teirra grundøki. Spurningurin um, hvørjar rættarfylgjur, ið standast kunnu av, at tílíkt boð frá kommunu verður ikki hildið, verður viðgjørt undir 4. punkti. Her skal bert verða nevnt, at eingin ivi kann vera um, at búnaðarráðgevarin kann eisini geva tílík boð.

Viðvíkjandi spurninginum um høvi til at nerva tær fyrisettu treytir verður sagt í greinargerðini til 9. §, at fyrisettar treytir frá búnaðarráðgevaranum kunnu ikki »skjótast inn til hægri avgerð«. Hetta má merkja, at fyrisitingarlig aftursókn er eingin. Landsstýrið kann tí ikki skúgva til viks avgerðir búnaðarráðgevarans. Men spurningurin um gildi teirra má kunna verða skotin inn fyri dómstólarnar, sum tó bert vilja kunna taka støðu til, um búnaðarráðgevarin hevur havt neyðugu heimildina í lógini til at fyriseta treytirnar, meðan dómstólarnir ikki fara at kunna finnast at búnaðarráðgevarans gjørdu metan um, hvørjar atgerðir mega ætlast at vera hóskandi í teimum einstøku førunum.

Spurningurin um, hvørt fyrisettar treytir frá kommununum hava gildi, má kunna verða royndur við dómstólarnar, ið eisini mugu kunna taka støðu til, um kommunurnar, tá ið samanum kemur, við rættarfylgju kunnu geva tílík boð, tá ið heimild til tess ikki er nevnd í lógini, ella við øðrum orðum, um landsstýrið við at geva út tílíka reglugerð er farið út um tað, sum lógin heimilar. Fyrisitingarliga mugu boðini frá kommunu ætlandi kunna verða skúgvað til viks av búnaðarráðgevaranum, annaðhvørt sambært embætisskyldu sína (ex officio) ella eftir klagu frá avvarandi borgara.

4. Tvingsil til fremjing av rottuoyðing.

Sum nevnt omanfyri ásetur 5. § í lógini, at fyrisettu treytir búnaðarráðgevarans skulu vera loknar innan ein mánað. Eftir 4. §, 3. stk. í lógini skal búnaðarráðgevarin ella løgreglan ansa

eftir, at fyrisettu treytirnar eru loknar innan givnu freist, sum møguliga kann vera longri enn ein mánað, smb. omanfyri. Verður tað ikki, er eftir 5. § skylda búnaðarráðgevarans at lata gera tað, sum neyðugt er, »fyri eigarans rokning«. Útreiðslurnar av hesum kunnu verða heintaðar við panting, og »heftir eigindómin framman undan øðrum panti«. Í greinargerðini til 5. § verður sagt, at henda regla kann tykjast hørð, men er eftir royndum aðrastaðni ikki ov hørð. Hetta kann tó kanska kjakast um. Ið hvussu er, tykist tað heldur hart at tyngja eigaran við hesum útreiðslum, um hann ikki er sjálvur »skyldigur« (»den ansvarlige«), og má tí í tílíkum førum verða givið eigaranum at vita um tað givna boðið.

Nýtslan av teimum strongu reglunum í 5. § verður avmarkað av tilvísingini í greinini til 4. §. Við tað at reglurnar í 5. § bert kunnu nýtast, tá ið treytirnar fyrisettar sambært 4. § ikki eru loknar, eru tær ónýtiligar í tí føri, tá ið ein (vanligur) eigari ikki ger skyldur sínar sambært 3. §. Tær eru ætlandi eisini ónýtiligar, tá ið ikki verður gjørt eftir teimum boðum, ið kommununurnar geva eftir 6. § í reglugerðini. Tá ið lógarinnar 4. § ikki nevnir hesi boð frá kommununi, kann neyvan verða sagt, at tey eru givin eftir 4. §.

Ikki at gera eftir givnum boðum kann eftir 10 § eisini hava við sær sekt. Meðan 5. § er um vanligan undandrátt undan at lýða givin boð, er 10. § um treyðan undandrátt. Til at verða revsaður krevst týðulig fráboðan frá honum, sum skyldan liggur á, um at hann *vil* ikki gera eftir boðunum, smb. serstakliga orðið »vægring« í lógarinnar danska teksti. Sigur hann einki, men letur bert vera at gera eftir boðunum, kann hann ikki verða revsaður. Danska lógin frá 1961 hevur ikki samsvarandi skilnað ímillum avleiðingarnar av tí vanliga undandráttinum og tí treyða, við tað at í báðum førum verður revsað við sekt, smb. 4. § í donsku lógini.

10. § talar um »hann, sum ber seg undan boðum eftir hesi lóg«. Greinin vísir tískil ikki serstakliga til 4. §, men við tað at bert í 4. § er heimild til at geva boð, má ætlandi verða

hildið, at bert hin treyði undandrátturin undan at gera eftir hesum boðum kann verða revsaður. Av tí fylgir — smb. tað, sum omanfyri er sagt um 5. § — summpart at undandráttur ánaranna undan at gera skyldur sínar eftir 3. § ikki kann verða revsaður, og summpart at undandráttur undan at gera eftir kommununnar boðum eftir 6. § í reglugerðini er ikki revsiverdur.

Tí vansanum, at lógarinnar 5. og 10. § kunnu ikki nýtast viðvíkjandi síðstnevnda forboð, slepst undan, við at tey neyðugu forboðini altíð verða sett av búnaðarráðgevaranum; men truplari er at verja seg fyri fylgjunum av, at hesar greinir ikki kunnu nýtast viðvíkjandi vanligum ánarum o. øðr. fl., ið ikki gera skyldur sínar eftir 3. § í lógini. Vit sakna her revsiáseting, ið samsvarar 4. §, síðsta punkti í donsku lógini frá 1961, har ið stendur, at tann »der hindrer de af kommunalbestyrelsen dertil bemyndigede personer eller foreninger i at foretage de fornødne foranstaltninger til rotteudryddelse, herunder kontrol med en foretagen udryddelse« kann verða revsaður við sekt.

Av tí frammanfyri nevnda fylgir ikki, at vit als ikki kunnu hevja rættarsókn móti ánarum, ið ikki gera skyldur sínar eftir 3. § . Forðar ánarin eiturleggjaranum í virki sínum, má fútaforboð kunna verða lagt ímóti tí, og dregur hann undan at hjálpa eiturleggjaranum, kann hann fáa dóm og fær sambært honum skyldu at hjálpa í so stóran mun, sum dómurin tilskilar. Brot á fútaforboð og treyður undandráttur undan at gera eftir dóminum kunnu verða revsað, men hetta er heldur torvunnin mannagongd. Nógv lættari hevði tað verið, um løgreglan bert kundi hevja revsimál ímóti tí tvøra.

Frammanfyri er bert talað um at tvinga privatar til at gera skyldur sínar sambært lógini. Í 7. og 8. § í reglugerðini eru nakrar reglur um, hvat ið gjørt skal verða við tær kommunur, sum ikki gera skyldur sínar. Í 7. § verður sagt, at búnaðarráðgevarin hevur eftirlit við, at kommunurnar gera skyldur sínar. Hann skal geva landsstýrinum frágreiðing, um nakað

er at átala tí viðvíkjandi. Landsstýrið kann so eftir 8. § seta í verk tær atgerðir, sum tað heldur vera hóskandi, fyri kommununnar rokning.

Tað er at vóna, at tey ymissu ikki rættiliga greiðu punktini í núgaldandi lógini verða bøtt við komandi endurskoðan, smb. 11 § í lógini.

SUMMARY

Rats and mice are the only wild mammals to be found in the Faroe Islands. The latter are presumably brought to the country by the Irish hermits. Mice are not to be found on all the islands and the damage caused by them is not so extensive as to require special legislation.

The black rat has presumably come to the Faroe Islands in the Middle Ages, as an epidemic like the Black Death could hardly develop without the presence of rats. There is some indication that the rats — apart from Tórshavn — have disappeared from the islands after the Black Death, and that only towards the middle of the 17th century they have gained ground again.

It is supposed that the brown rat came to the Faroe Islands in 1768. It soon spread over most of the islands and crowded out the black rat. It caused serious damage at the beginning, but it looks as if the damage has been less in the 19th century. In 1895 and 1902 there are *grannastevnur* (meetings of the landowners of a village) which deal with matters concerning rat extermination. In 1907/08 the question of the coming into force of the Danish Rats and Mice Destruction Act of March 22, 1907, is submitted to the *Løgting* (the Faroese Parliament), the members of which take no interest in it. The subsequent Danish Rats and Mice Destruction Act of April 18, 1910, is put into force by promulgation without having been submitted to the *Løgting*, but it becomes of no importance. On the other hand, in 1915/16 the *Løgting* deals with a matter concerning the rat nuisance but leaves extermination to private enterprise, and from 1916/17 there are a couple of regulations adopted at *grannastevnur* concerning rat extermination. The Danish Rats and Mice Destruction Act of March 29, 1924 is put into force in the Faroe Islands without submission to the *Løgting*, but as was the case with the Act of 1910, it acquires no importance. It has hardly been realized that it was in force in the country, which, among other things, appears from the discussion of the *Løgting* in 1937/38 on the organization of rat extermination in the Faroe Islands.

In the last part of the paper the author goes through the *Løgting*

Act of June 1, 1961, governing rat extermination and the annexed circular of May 16, 1962.

BÓKMENTIR

1. *Albeck* = Gustav Albeck: Knýtlinga saga (Kulturhistorisk Leksikon for Nordisk Middelalder. VIII. 1963).
2. *Brehm* = A. Brehm: Dyrenes Liv v/ J. O. Bøving-Petersen. Kbh. 1907.
3. *Claussøn Friis* = Peder Claussøn Friis: Norriges oc omliggende Øers sandfærdige Bescriffuelse. 1632.
4. *Debes* = Lucas Jacobsen Debes: Færoæ et Færoa reserata. Kbh. 1673.
5. *Degerbøl* = Magnus Degerbøl: Mammalia (The Zoology of the Faroes. LXV. Bd. III, 2. Kbh. 1935—42).
6. *Falk & Torp* = H. S. Falk & Alf Torp: Norwegisch- Dänisches etymologisches Wörterbuch. Oslo & Bergen 1960.
7. *FFÆ* = *Jakob Jakobsen:* Færøske Folkesagn og æventyr, Tórshavn 1961—64, bl. 220—21.
8. *Holberg* = Ludvig Holberg: Epistola CXVI (utg. 1945 II, bl. 118 við viðmerkingum av Billeskov Jansen VI bl. 187—88).
9. *Joensen, Robert* = Robert Joensen: Royvið. Klv. 1958.
10. *Lagt.* = Lagtingstidende.
11. *Landt* = J. Landt: Forsøg til en beskrivelse over Færøerne. Kbh. 1800.
12. *Lauritzen Wolff* = Jens Lauritzen Wolff: Norvegia illustrata. Kbh. 1651.
13. *Lenvig, Tummas* = Tummas Lenvig: Húsfrúgvin í Húsavík. (Hugnalig Jól. Klv. 1962).
14. *Lund, Troels* = Troels Lund: Dagligt Liv i Norden. Kbh. 1908 (VII, bl. 25—26).
15. *Løgt.* = Løgtingstíðindi.
16. *Nielsen, Bro* = Ole Bro Nielsen: Middelalderens pestepidemier. (Vor Viden 5. Rk. II — 1958/59).
17. *Ostenfeld* = C. H. Ostenfeld: Dyrelivet (De danske Atlanterhavsøer. II. Færøerne. Kbh. 1905).
18. *Pedersen, Alwin* = Alwin Pedersen: Myggenæs. Kbh. 1935.
19. *Pedersen Beyer* = Absalon Pedersen Beyer: Om Norgis Rige (cit. eftir Jakob Jakobsen í Útiseta VII. Kbh. 1952).
20. *Petersen, Herluf* = Herluf Petersen: Hjemmets Skadedyr. Kbh. 1939.
21. *Petersen, Ludvig* = Ludvig Petersen: Sandavágs søga. Tórsh. bl. 292—94.
22. *Poulsen, Jóan Chr.* = Jóan Chr. Poulsen: Hestsøga. Tórsh. 1947.

23. *Rischel* = Jørgen Rischel: Indledning og noter til Lucas Debes Færøernes beskrivelse. Kbh. 1963.
24. *á Ryggi* = Mikkjal D. á Ryggi: Dýralæra. Tórsh. 1935.
25. *Skarði, Jóhannes av* = Jóhannes av Skarði: Fróðskaparrit, 5. bók. Tórsh. 1956, bl. 126.
26. *Spärck* = R. Spärck: Dýralív (Føroyar I, Kbh. 1958).
27. *Stove & Jakobsen* = Sverre Stove & Jakob Jakobsen: Færøyane. Oslo 1944.
28. *Stubbe-Teglbjærg* = K. E. Stubbe-Teglbjærg: Emil Zuschlag (Dansk Biografisk Leksikon. XXVI. Kbh. 1944).
29. *Svabo* = J. Chr. Svabo: Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782. Udg. af N. Djurhuus. Kbh. 1959.
30. *Tang Kristensen* = E. Tang Kristensen: Danske sagn, som de har lydt i folkemunde. Bd. VI, I-B-23 (Ærhus 1899) og Ny Række Bd. VI, B-22 (Kbh. 1936).
31. *Tarnovius* = Thomas Tarnovius: Ferøers Beskrifvelser. Utg. av Håkon Hamre. Færoensia I. Kbh. 1950.
32. *Tingb. I* = Tingbókin 1615—54. Skrivað og givið út hevur Einar Joensen. Tórsh. 1953.
33. *Weissmann* = Carl Weissmann: Rotterne og deres familieliv. Gammelt og nyt om en samfundsfjende. (Vor Viden. 6. Rk. I 1959/60).
34. *Williamson* = Kenneth Williamson: The Atlantic Islands. London 1948.